**AÐALDEFINITIÓN AV TÆNASTUSKYLDUM LÆRARA**

Við støði í avtalu millum Føroya Lærarafelag o.g Fíggjarmálastýrið um arbeiðstíð frá 10. juli 1998 og avtalu um tænastumannasettar lærarar í semju millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið frá 30. apríl 2000.

Arbeiðstíðin hjá tænastumonnum v.m. í fólkaskúlanum samsvarar við arbeiðstíðina hjá landsins tænastumonnum og starvsmonnum við teimum broytingum, ið standast av tí sermerkta arbeiðinum.

Tað skylduga árliga undirvísingartímatalið er ásett við tí í huga, at umframt at fyrireika sjálva undirvisingina v.m., so hava tænastumenn fólkaskúlans skyldu til at røkja eina røð av uppgávum, ið ikki beinleiðis hava samband við undirvísingina, her íroknað m.a. sambandið millum heim og skúla, luttaka í ráðleggingarfundum saman við starvsfeløgum, umsjón við næmingum, lærararáðs- og felagslærararáðsfundir, luttøku teirra við loysn av ymiskum samfelagsligum uppgávum viðvíkjandi næmingunum og við fremjanini av royndum.